


## Føroyingur fongslaður fyri drápsroynd

Ein 39 ára gamal maður er fongslaður fyri drápsroynd móti fyrrverandi unnustu síni í Esbjerg. Hetta skrivar Ugeavisen Esbjerg. Sambært løgregluni í býnum skal maðurin hava roynt at kvala 44 ára gomlu kvinnuna við einum kodda. Eftir hvat skilst, er talan er um ein føroying, men hesi tíðindi vil løgreglan ikki vátta. Maðurin royndi í tveimum førum at kvala kvinnuna, sum tó slapp leys báðu ferðirnar, hann royndi at gera hetta. Stutt aftan á kom onkur úr familjuni inn í íbúðina, sum meldaði tilburðin til løgregluna. Maðurin hevur verið í grundlógaravhoyring, sum varð hildin fyri stongdum hurðum, og her varð varðhalds-fongslaður fram til 9. januar. Løgreglan vil ikki upplýsa meir um í løtuni um tilburðin.

## Óneyðugt at boða frá

Tá peningastovnarnir gjørdu av at steðga fyri allari nýtslu av Visa Elektron um náttina, boðaðu teir ongum frá um broytingina.

Í brúkarareglunum fyri hesi kortini stendur skrivað, at hesi kortini ikki kunnu nýtast sum úttøku- ella gjaldskort í tíðarskeiðnum frá klokkan 2 til 5.30. Sjálvt um hetta stóð skrivað í brúkarareglunum, var tað gjørligt at nýta kortini í hesum tíðarskeiðnum, og tað hava brúkarar og seljarar vant seg við.

*Tá bæði brúkarar og seljarar hava vant seg við at kortini eisini kunnu nýtast um náttina, áttu tit so ikki at boða tykkara kundum frá hesi broytingini?*

- Í hesum førinum hildu vit ikki at tað var neyðugt at boða frá hesum inntrivinum. Vit halda okkum bara til brúkaratreytirnar og tað, sum vit hava marknaðarført kortið við. Hasi kortini eru hóast alt opin 20 tímar í døgninum, og vit kunnu bara ráða okkara kundum til at taka kontantan pening út, áðrenn sjálvtøkurnar lata aftur, ella at altíð hava tvey ymisk kort á sær, skuldi annað ikki rigga, sigur Gunnar Nolsøe, deildarleiðari hjá Eik í Suðurstreymoy.

# Bankar læsa gjaldskort

**Uttan fráboðan hava føroysku peningastovnarnir við virkni frá 24. november í ár gjørt av at steðga nýtsluni av Visa Elektron sum gjaldskort um næturnar. Kaféir, barrir, hýruvognar og brúkarar eru óvitandi um broytingina og hava brent seg fleiri ferðir av tí sama og standa spyrjandi eftir**



GJALDING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Seinastu árini hava rættiliga nógv ung valt at fáa sær eitt gjaldskort av slagnum Visa Elektron. Hetta kortið er gjørt serliga til ung fólk, av tí at hetta kortið ikki kann setast í trot. Men hetta er eftir øllum at døma ikki tað einasta, hetta slag av korti ikki kann.

Náttina til sunnudagin 23. november kundi tú nevnliga fara á barr, kafé, seta teg í ein hýruvogn ella keypa á internetinum og gjalda við Visa Elektron uttan trupulleikar.

Náttina eftir er støðan ein heilt onnur. Tá høvdu peningastovnarnir gjørt av at stramma upp við nýtsluni av Visa Elektron, og kundi tú tá brádliga ikki longur nýta hetta kortið sum gjaldsmiðil frá klokkan 2 til 5.30, sama tíðarskeið sum sjálvtøkurnar kring landið eru stongdar.

Orsøkin til at peningastovnarnir hava tikið hesa avgerð er at peningastovnarnir, í samráð við P/F Elektron, ið umsitir tekniska partin av skipanini og týdningarmest saldoeftirlitið, frá 24. november hava sett nýggjar mannagongdir í gildi, sum siga, at mest loyvda nýtsla á Visa Elektron kortunum er null krónur um náttina frá klokkan 2 til 5.30.

Tískil kanst tú ikki nýta Visa Elektron kortini sum gjaldsmiðil frá klokkan 2 til 5.30, soleiðs sum kundi áðrenn.

### Hvørki brúkari ella seljari fingu boð

Tá tú fært tær eitt Visa Elektron gjaldskort frá peningastovnunum, fært tú samstundis útvegað ein bókling ella eitt hefti við brúkarareglum saman við kortinum. Í hesum hefti, í øllum førum hjá Eik Banka, stendur tó skrivað at kortið ikki kann nýtast sum úttøku- ella gjaldskort í tíðarskeiðnum frá klokkan 2 til 5.30 um náttina.

Hóast hetta stendur í brúkarareglunum hevur tað, síðan kortið kom á marknaðin, verið gjørligt at nýta kortið sum gjaldsmiðil hetta tíðarskeiðið.

Hetta hava bæði brúkarar og seljarar tikið til sín og vant seg við. Serliga hevur hetta verið nýtt í vikuskiftunum, tá nógv ung fólk nýta hesi kortini til at gjalda við á kaféum, í náttklubbum, pitsabúðum ella fyri hýruvognin.

Tískil standa bæði brúkarar og seljarar nú brádliga sum tvey stór spurnartekin og uttan frágreiðing, tá kortið verður avvíst av terminalinum. Hvørgin veit grundgevingina. Eigarin av kortinum veit at peningur er tøkur á kontuni, og seljarin veit at terminalurin tekur Visa Elektron og at sambandið er í lagi, tí onnur kort ganga ígjøgnum.

### Teknisk frágreiðing

Tað er fyritøkan P/F Elektron, ið umsitur allan peningastreymin fyri bankarnar. Við teirri skipan og teirri útgerð, teir hava í løtuni, verða teir noyddir at lata skipanina aftur nakrar tímar um náttina, frá klokkan 2 til 5.30, meðan teir gera backup av skipanini og tryggja tann platformin, skipanin er bygd á.

Hesar tímarnar, meðan skipanin ikki er virkin, er saldoeftirlitið eisini niðri. Hetta merkir so at tað lyfti, sum bankarnir geva, tá teir útflýggja kortini, at tað ikki kann yvirtrekkjast, er ógjørligt at halda. Hesar tímarnar bar nevnliga til at